# Johan í Kollafirði pilkar fja



*- Tað ger onki, um vit øll skíta í buks, um vit onki leggja í tað, tí so hava vit jú 'loyst' problemið, hugleiddi Johan í Kollafirði í síni røðu um innbilta føroyska fólkaræðið*

**Millum mongu innsløgini á ólavsøku gjørdi Johan í Kollafirði 'come back' í egna besta stíli á Fólkafundinum við eini røðu til allar forvandar og vilstar føroyingar. Hesir rúmaðust ikki allir í trongu gøtunum úti á Reyni hesa løtuna, og prenta vit tí røðuna her**

Hey... Riggar mikrofonin? Hallóv 1-2, 1-2... nei hon riggar ikki... (kunstpausa) Riggar hon nú? Okey... 3-2-1:

Føroyingar, vinir og frændir. Takk fyri stuðulin, takk fyri uppmøtingina, og takk fyri, at tit enn eru føroyingar, sjálvt um tað leingi ikki hevur sæð út til, at tað er nøkur grund til at vera tað. Sjálvt um tað leingi ikki hevur verið nøkur grund til nakað sum helst annað, enn at vakna, smyrja matpakkar, sita í trafikkproppum, arbeiða uttan grund, dag út og dag inn, bara avbrotið av einari árligari ólavsøku, sum man ikki minnist allíkavæl og so víðari og so víðari og blablabla og mangt er og sovorit. Takk fyri.

Politikkurin í Føroyum hevur so lítið við politikk at gera, at ongin politikkur er. Føroyar hava slett ikki nakran politikk. Og akkurát, sum man snakkar um konufólk á saltfiskatúrum, so snakkar man um politikk í Føroyum... Man snakkar um tað, sum ikki er ... og um veðrið.

Men lat meg snakka um meg sjálvan... Eg vaknaði ein dagin, í einum trafikproppi, við smurdum matpakka í taskuni á veg til eitt arbeiði, sum slett ikki líktiskt tí arbeiðinum, eg droymdi um, tá ið eg var lítil. Tað vísti seg nemliga, at tá eg endiliga var nóg stórur til at bestemma alt sjálvur, valdi eg ting, sum eg

Sosialurin